# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skalta og valta við valskipan

Meðan hesar reglur verða prentaðar, bera tingfólk fram sínar hugsanir um tey fýra uppskotini um at broyta løgtingsvalskipanina, sum eru løgd fyri løgtingið, og sum í dag verða viðgjørd undir einum.

Tað er bæði grátuligt og láturligt, soleiðis sum okkara høga parlament viðgerð ta grundleggjandi skipanina, sum er tilverugrundarlagið undir sjálvum parlamentinum, valskipanina. Vit hava nevnt tað fyrr, at tað var ikki rættur framferðarháttur, sum varð nýttur, tá løgtingið í 2007 avgjørdi at broyta valskipanina frá at hava sjey valdømi til at verða eitt valdømi. Harvið er ikki sagt, at tingið tók eina skeiva avgerð, tí tað vita vit ikki enn.

Men tað er ikki rætt, at løgtingið áðrenn valskeiðið er hálvrunnið aftur broytir skipanina – serliga ikki tá grundaður mistanki er um, at tingmenn gera hetta fyri at sæta sær sjálvum til næsta val. Her er okkurt grundleggjandi galið. Spurningurin er, um løgtingsfólk skuldu havt hetta valdið – at kunna skaltað og valtað við valskipanini, sum teimum lystir.

Grundgevingarnar fyri og ímóti kunnu vit altíð kjakast um. Vit kunnu skjótt finna grundgevingar fyri, at øll øki í landinum eiga at verða umboðað. Men vit kunnu eisini skjótt finna grundgevingar fyri, at allir flokkar eiga at hava sama møguleika at verða umboðaðir alla staðni í landinum, og vit kunnu skjótt finna grundgevingar fyri, at skipanin við einum valdømi tryggjar kvinnum betri rætt til umboðan.

Hinvegin kunnu vit samstundis staðfesta, at tað eru flokkarnir, sum eiga at tryggja, at kvinnur og menn eru rímiliga javnt umboðað í tinginum. Vit kunnu eisini staðfesta, at flokkarnir eiga at tryggja, at øll øki í landinum eru rímuliga javnt umboðað í tinginum.

Við at fara aftur til gomlu valskipanina skerjir løgtingið møguleikan hjá fólkinum at velja júst tað valevnið, sum tey ynskja at stuðla. Er tað rætt at velja ein norðoying, bara tí hann ella hon er norðoyingur, at velja ein sandoying, tí at hon ella hann er sandoyingur ella eina kvinnu tí at hon er ein kvinna? Klára vit fáu menniskju her á klettunum ikki at velja í felag í einum valdømi, so er tað demokratiska problemið fullkomið.

Tað skilabesta av teimum fýra uppskotinum, sum nú liggja á tingborði er uppskotið hjá John Johannessen, Annitu á Fríðriksmør og Poul Michelsen um, at formansskapur Løgtingsins setir ein serkønan arbeiðsbólk at viðgera øll viðkomandi fólkaræðislig og samfelagslig viðurskifti í vallógini og fyrireika uppskot til nýggja løgtingsvallóg eftir teimum niðurstøðum, ið arbeiðsbólkurin kemur fram til.

**Sosialurin**

## Rættleiðing



**ANDREA HEINDRIKSDÓTTIR**
forkvinna í skúlastýrinum fyri Tórshavnar Kommunuskúla

**Áhaldandi ósannindi eru seinastu dagarnar varpað út í føroysku fjølmiðlarnar viðvíkjandi 10. floksskipanini í Tórshavnar Kommunu – tí hesa rættleiðing!**

Skúlastýrið í Tórshavnar Kommunuskúla hevur ongantíð viðmælt, at 10. flokkarnir í kommununi skulu savnast í ein depil í Eysturskúlanum, men hevur hinvegin staðiliga víst avvarðandi myndugleikum á skeivleikarnar við hesi mannagongd. Tórshavnar Kommuna hevur uttanum skúlastýrið tikið avgerð um at flyta allar næmingar í 10. flokki til Eysturskúlan, og hetta hevur kommunan ikki einvíst loyvi til sambært galdandi fólkaskúlalóg.

Mentamálaráðið góðtók ikki umsókn frá Tórshavnar Býráði um at savna allar 10. flokkarnar í Tórshavnar Kommunu í sjálvstøðugan skúla og bygnað, við sjálvstøðugari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í 10.flokki. MMR vísti á aðra skipan. Men í staðin fyri at gera skúlastýrunum greitt at upprunaliga uppskotið ikki bleiv góðkent, valdi Tórshavnar Býráð at arbeiða víðari við eini ætlan, sum býráðið ikki hevur heimild til at seta í verk.

Hóast at tað ikki hevur skortað uppá viðmerkingar frá politikkarum, Føroya Lærarafelagi, skúlastýrum o.ø. júst viðvíkjandi manglandi heimildini hjá Tórshavnar Býráði í hesum málinum, hevur býráðið ikki latið við seg koma, men bara trýst skipanina ígjøgnum. Hetta er júst orsøkin til støðuna, sum hon er í dag.

Skúlastýrið í Tórshavnar Kommunuskúla heldur seg til galdandi lógir, reglur og ásetingar. Í fólkaskúlalógini stendur greitt, at tað eru skúlastýrini, sum skulu gera uppskot til nýggjan skúlabygnað. Uppskotið at savna allar 10.flokkarnar í Tórshavnar Kommunu í ein depil í Eysturskúlanum er uppskot, sum skúlastýrini onga ávirkan hava havt á, og tí kann skúlastýrið í Kommunuskúlanum als ikki góðtaka hesa mannagongd.

Tórshavnar Kommunuskúli hevur í dag eina vælvirkandi 10.floksskipan, sum er tilevnað av starvsfólki skúlans seinastu 5 árini, og tað er tí púra burturvið at flyta hesar næmingar í annan skúla í kommununi. Tórshavnar Kommunuskúli hevur góð úrslit at vísa á og hevur sera góðar umstøður at undirvísa næmingum í 10. flokki. Tí er als ongin grund at flyta hesar næmingar í ein annan skúla.

Skúlastýrið fyri Tórshavnar Kommunuskúla kennir tað sum sína ábyrgd at tryggja næmingunum í skúlanum best møguligt kor. Í hesum sambandi er skúlastýrið av teirri áskoðan, at tá uppskotið frá øllum skúlastýrunum í kommununi ikki kundi góðtakast, so eiga næmingarnir í 10. flokki at vera verandi í skúlanum. Skúlastýrið ætlar tí at skipa soleiðis fyri, at næmingar í 10. flokki eisini komandi ár fáa undirvísing í Tórshavnar Kommunuskúla.

*Tórshavn, tann 15. mars 2010*

## Ódámlig herferð móti kringvarpsfólki

 

**HØGNI Í JÁKUPSSTOVU OG ÓLUVA ZACHARIASEN**
Redaktiónsleiðarar á Tíðindadeildini

Í greinini »Nú er bara lygnin eftir í Fiskimálaráðnum« spillir løgtingsmaðurin Tórbjørn Jacobsen enn einaferð starvsfólk í Kringvarpinum út.

Tjóðveldistingmaðurin hevur ilt av, at eftirmaður hansara í Fiskimálaráðnum, Jacob Vestergaard, er komin til orðanna í Útvarpinum og velur tí at fara beinleiðis eftir tíðindamanninum, heldur enn málinum.

Hetta er tíverri ikki fyrstu ferð, at Tórbjørn Jacobsen nýtir slíkan framferðarhátt móti tíðindafólkum, tá hansara politisku kappingarneytar sleppa framat í tíðindunum.

Um Tórbjørn Jacobsen heldur, at Kringvarpið hevur borið rang tíðindi, er hann vælkomin at kæra um tíðindaflutningin. Og um hann ikki er nøgdur við svarið, hann fær frá Kringvarpinum, hevur hann eisini møguleikan at kæra til Fjølmiðlanevndina.

Men ein slík ódámlig herferð móti einum vanligum tíðindafólki, átti at verið langt undir tignina hjá einum fólkavaldum umboði.

## Kynskvotur: Tingið skal avspegla fólkið



**INGRID S. HENRIKSEN**

Í Føroyum hava einans 5 kvinnur sæti í løgtinginum. Hetta er bert 15, 2% av samlaða tingfólkatalinum, ið er 33 tingfólk. Stór yvirumboðan er sostatt í løgtinginum av monnum.

Mikudagin hin 17. mars 2010 verða heili 4 uppskot viðgjørd í løgtinginum um at broyta valskipanina til løgtingið. Harav snúgva 2 seg um, at vit aftur skulu hava økiskvotur. Ikki hoyrist eitt kis frá okkara lóggávutingi – løgtinginum – um at vit mugu fáa betri kynsjavnstøðu í tinginum.

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, úttalaði seg í útvarpinum hin 5. mars 2010 um føroysku valskipanina. Hann legði dent á, at »tingið skal avspegla fólkið«. Henda útsøgn er eftir mínum tykki sera beinrakin. Vit vita, at føroyska fólkið fevnir ikki bert um menn, men um bæði kvinnur og menn. Vit mugu tí – ongantíð ov skjótt, eins og onnur framkomin samfeløg – tilevna og samtykkja lóggávu, ið tryggjar kynsjavnstøðu á tingi. Tá gerst Føroya Løgting umsíðir ein avspegling av fólkinum.

*Tórshavn hin 15. mars 2010*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.